*Morgunsangur í Kommunuskúlanum*



# Ikki sum aðrir

**10. flokkur í Kommunuskúlanum í Havn er ikki sum aðrir 10. flokkar.
– Frá at hava verið eitt parkeringspláss har ein kann sita og sova í eitt ár er 10 í flokkur blivin eitt stað, har næmingar aðrastaðni úr kommununi koma at læra seg ymiskt nýtt sum spanskt og Cambridge enskt, sigur Petur Reinert, ein av lærarunum, ið hevur umskipað tilboðið í 10. flokki í Kommunuskúlanum í Havn**

## Skúli



**Inna Törnroos**
blaðkvinna
inna@sosialurin.fo

Tá tey ungu byrja í 10. flokki í Kommunuskúlanum eru boðini greið:

»Tit eru liðug við fólkaskúlan, nú hava tit meldað tykkum inn aftur í skúlan fyri at ganga 10 árið«.

Árið er ikki kravt – tað er nakað, ein ger, tí at hugurin er til tað.

Og mangt bendir á, at hesin hugburður er nakað, sum dámar teimum ungu eftirsum talið av næmingum er í støðugum vøkstri, síðani Kommunuskúlin byrjaði við at broyta 10. flokk.

Í hinum skúlunum í Havn eru tað um 40-50 prosent av næmingunum, ið velja at halda fram í 10. flokki, meðan tað í Kommunuskúlanum er heili 74 prosent.

Tað eru tey trý, Mari Ann Hansen, Petur Reinert og Bergur Rasmussen, ið hava arbeitt við hesi nýggju skipan av 10. flokki síðani 2005, og hvørt ár hava tey eftirmett og broytt eitt sindur.

– Vit geva næmingunum størri ábyrgd og hava skipað undirvísinigina í longri blokkum upp á fýra tímar, tá tey hava føroyskt, enskt, støddfrøði og danskt, sigur Mary Ann Hansen, varaskúlastjóri og lærari í 10. flokki.

Eisini eru nýggjar lærugreinir sum Cambridge enskt og spanskt komnar upp á tímatalvuna.

– Vit hava verið so heppin, at vit hava lærarar á skúlanum, sum kunnu undurvísa í hesum, og til Cambridge enskt hava vit tætt samstarv við Fróðskaparsetrið, sigur Petur Reinert.

Aftrat hesum hava næmingarnir eina breyt, har veljast kann millum t.d. matgerð, tónleik, ítrótt og miðlar.

– Tá tey byrja í 10. flokki skriva øll eitt ætlanarskjal, har tey



**Rakul Jacobsen, 16 ár, Havn:**
– Eg havi gingið 9 ár í Venjingarskúlanum men vildi royna okkurt nýtt nú, tá eg skuldi fara í 10. flokk. Vit eru níggju, sum eru flutt higar til Kommunuskúlan. Eg kendi meg ikki rættuliga klára at fara beinleiðis í Miðnámsskúla, men eg ætli mær at fara í Handilsskúla aftan á 10. flokk.




**Martin Kragesteen, 16 ár, Havn:**
– Eg havi gingið í Nonnuskúlanum, men í framhaldsdeildini í Kommuskúlanum. Mær dámdi betri at ganga á Nonnuskúlanum, eftirsum tað var reinligari har. Tað sum er betri her er, at tað er fríari, eftirsum vit hava fýra lærarir. Aftan á skúlan vil eg fegin royna at fara út at sigla.

Sosialurin